


***Nr. 5*** ***4. mars 2018*** ***78. árg.***

# Fylgið leið Harrans

*„Fylgið altíð teirri leið, sum Harrin, Gud tykkara,*
*hevur boðið tykkum at ganga.“ 5. Mós. 5, 33.*

Hvat er vorðið av teim 10 boðunum? Eru tey horvin? Summi lærdu tey einaferð fyri mongum árum síðani. Men í dag smílast fólk, um tey verða tikin fram, og siga, at tey 10 boðini onki hava við kristindóm at gera. Tey vórðu givin jødunum, men tíðin við lógini er farin.

Hasum skalt tú ikki vera so vísur í, tí Jesus nevnir nøkur teirra í Fjallataluni. Hann legði enntá meira í tey, men tók tey als ikki av. Hann umskapaði tey við at minna okkum á, at boðini ikki bert snúgva seg um gerðir okkara, men at sinnalagið ger av, hvussu vit handla.

Í teim 10 boðunum møta vit Guds góða vilja. Men boðini fáa ikki tann rætta dámin, um vit gloyma inngangsorðini til boðini: „Eg eri Harrin, Gud tín, sum leiddi teg út úr Egyptalandi, úr trælahúsinum: Tú mást ikki hava aðrar gudar enn meg.“ Við Guds stóru vælgerðum sum grundvølli verða boðini nú nevnd, eitt fyri og annað eftir, fyri at Guds útvalda fólk kann fáa hjálp at ganga rætta vegin.

Rætt er tað, sum ein listamaður ein dagin fyri mongum árum síðani segði, tá ið støðan í heiminum var til umrøðu: „Ja, kristindómi havi eg ikki nógv skil fyri, men mundi ikki alt sæð øðrvísi út, um menniskju høvdu valt at livað eftir teim 10 boðunum?“ Ja, hasum er onki at ivast í.

Kristindómur er ***ikki*** lógarboð. Men við líka so stórari áherðslu kann sigast, at spurningurin: Hvat er rætt, má fáa

hetta svarið: ***Rætt er tað sama sum Guds vilji.*** Gud vil ikki, at óskil skal vera í tí heimi, sum hann hevur skapað. Lóg hansara er eitt lívdarhegn, og tí er vandi á ferð, um hegnið verður tikið niður.

Fylgið altíð tí vegi, sum Harrin hevur álagt tykkum at ganga. Tað varð sagt við ísraelsfólk, og tað verður sagt við okkum. Tann, sum biður um og stríðist fyri at finna ***Guds*** veg, villist ikki. Tí kanst tú vera vísur í.

*Um tú vilt gleði vinna,*
*søk ei til hægsta sal!*
*Nei, eydnan er at finna,*
*har grannar semjast væl,*
*har kærleikin man ráða*
*har blídni er við borð,*
*har mildar tungur sáa*
*tey mjúku troystarorð.*

*Tey, sum Guds vilja gera,*
*og elska fólk og land,*
*tey signing við sær bera,*
*sum sløkkir hatskan brand.*
*Tey lýsa gjøgnum strevið,*
*tey bjarga lond úr neyð,*
*tey sigra víst. Gud gevi,*
*vit teljast millum tey.*

# Gud ja! Men Jesus?

Í 1976 kom ein bók út, sum æt „Gud ja! Men Jesus?“ Tað var Wilhelm Busch, sum størsta partin av lívi sínum var ungdómsprestur í Essen, sum skrivaði hana.

Menniskju kunnu saktans taka Gud í sín munn, men tá ið tey skulu nevna Jesus, tá vil tungan ballast, og tey hava torført at siga navn hansara – uttan, tá ið tey blóta og banna! Hví man tað vera so? Jú, tí øll frelsan hongur uppi í Jesusi. Gud hevur ikki knýtt frelsuna upp í seg, men hann hevur sett ein millummann millum okkum og seg. „Tí at ein er Gud, ein er eisini millumgongumaðurin millum Guds og manna, maðurin Kristus Jesus, sum gav seg sjálvan sum loysigjald fyri øll.“ 1. Tim. 2,5-6. Hvussu fáa vit lut í hesum? Við at taka ímóti tí. „Men so mongum, sum tóku ímóti honum (Jesusi), teimum gav hann mátt (ella: rætt) til at verða Guds børn, teimum, sum trúgva á navn hansara.“ Jóh. 1,12.

Hví blíva vit ikki frelst við bara at trúgva á Gud? Tí heimurin er fullur av sonevndum „gudum“, sum ikki eru annað enn avgudar. „Tann, sum hevur sonin, hevur lívið; tann, sum ikki hevur Guds son, hevur ikki lívið.“ 1. Jóh. 5,12. Jesus sjálvur sigur: „Eingin kemur til faðirin uttan við mær.“ Jóh. 14,6.

Tað er bara ein røtt trúgv, sum vit kunnu liva og doyggja uppá: tað er trúgvin á Jesus Kristus, son Guds. Jesus hevur sjálvur sagt: „Í faðirs míns húsi eru mangir bústaðir.“ Jóh. 14,2. Men tað eru bara einar dyr til Guds bústaðir: „Eg eri dyrnar. Gongur nakar inn um meg, skal hann verða bjargaður (frelstur).“ Jóh. 10,9.

Jesus er dyrnar! Men tað vilja summi fólk ikki hoyra um. Eg sigi tær: Bara trúgvin á Jesus Kristus, Guds son, er ein bjargandi og frelsandi trúgv, sum vit kunnu liva og doyggja uppá.

*Effie Campbell* umsetti.

# Vernd mín

*Harri, klettur **mín**, høli **mítt,** Gud **mín,** vernd **mín,***
*har eg fái lívd, skjøldur **mín,** virki **mítt,** horn*
***mítt,** har **eg** fái frelsu.*

*Sálmur 18,3.*

Fyri hesum manni var Gud ikki bara ein hugsan, ein skuggakend vera, men ein veruleiki. Hesum hevði hann mong prógv fyri. Hann hevði ikki bara hoyrt um hann, men sæð hann við eygum sínum. Gud var komin á lívsleið hansara, og hann var komin í samband við hann.

Hjá mongum menniskjum er Gud ikki so frægt sum komin í huga teirra. Tey liva í gudloysi. Tey sannkenna hann ikki á nakran hátt. Tey boyggja seg ongantíð fyri dagligu miskunn hansara. Tey søkja sær ikki hjálp hansara í bøn. Tey søkja sær ikki vegleiðing ella undirtøku. Tey eru gudleys.

Men viðvíkjandi hesum manni er øðrvísi. Hann livir eitt satt gudslív. Gev tær far um, hvussu hann kallar Gud. Lív hansara man hava verið fult av trupulleikum, stríði, vanda og veikleika. Men Gud hevur lyft hann upp um alt samalt og verið við honum. Átta ferðir kallar hann Gud Gud ***mín.*** Hann hevur gripið hann og stendur fast við hann. Hann talar ikki um, hvat Gud var, men um hvat hann **er**, **og hvat hann hevur at týða fyri seg.** Hvat gagn er í tí at vita nógv um Gud, tá ið hann er ikki Gud tín?

Men tað var jú tí, at Kristus doyði fyri at føra okkum til Guds, at eitt inniligt samband var komið í lag. Kristindómur er at liva saman við Gudi. Tí møtir Gud okkum við sínum

náðievnum, fyri at vit kunnu koma til hansara, líta á hann og sannroyna hann í dagliga lívi okkara, ikki bara onkuntíð.

*t.* týddi.

# Sporini í kavanum

Fimm børn spældu í skóginum ein vakran vetrardag, og á eini fløtu fóru tey at kappast um, hvør kundi seta tey beinastu sporini í kavan. Tey gjørdu sær ómak við at seta annan fótin beint framman fyri hin, men tá ið tey vóru komin út um skógarmunnan, sóu tey, at hjá einum fóru sporini í ein boga, hjá tveimum øðrum var tað ikki mætari, og hjá einum fjórða vóru tey næstan sikksakk. Men ein teirra fekk sporini at vera í einari beinari linju. Hvussu hevði hann klárað tað? Við hvørki at hyggja niður ella eftir hinum børnunum, men í staðin at festa eyguni á eitt granntræ heilt har frammi og síðani ganga beint ímóti tí.

Bíblian biður okkum festa eygu okkara á Jesus fyri at halda kósina beint fram ígjøgnum heimin. ***Latum tí okkum eisini..... renna tað skeið, sum er okkum fyrisett, við tað at vit líta til upphavsmann og fullkomnara trúarinnar, Jesus.***

(Hebr. 12,1-2).

---

Mark Twain segði einaferð skemtandi: „Tað tekur tvey ár at læra at tosa, og restina av lívinum at læra at vara sín munn.“ „Lat orð muns míns og hugsanir hjarta míns líka Tær.“ (Sálm. 19,14 V.D.)

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 4. mars | Tekstur: 1. Mós. 42,1-29 og 39-43; | bíbliuorð: Sálmur 32,1 |
| 11. mars | Tekstur: Matt. 21,1-9 | bíbliuorð: Matt. 21,5b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74




*Nr. 6* *18. mars 2018* *78. árg.*

# Harrin røkkur til okkara

*Sí, hond Harrans er ikki ov stutt til at frelsa, oyra hansara ikki so deyvt, at tað ikki hoyrir.*
*Jes. 59,1.*

Hvussu langt røkkur Guds armur? Tað er ein spurningur, sum altíð stendur okkum nær. Mangan kenna vit okkum at vera so djúpt niðri ella so langt burturi, at vit ikki duga at ímynda okkum, at hond Harrans nær okkum. Hvat prógv hava vit fyri, at armur Harrans ikki er ov stuttur? Ikki er lætt at bera eyga við hond hansara, um vit eru djúpt niðri í aldudalinum ella langt úti í oyðuni.

Tað er bara ein álítandi vitnisburður um, at Guds hond røkkur til okkara: **At Jesus kom niður her á jørðina.** Hann kom ikki bara niður á okkara støði, men heilt inn í umstøður okkara. Hann kom fyri at møta okkum har, sum vit eru, og ikki har, ið vit áttu at verið. Hann kom á tal við okkum á leið okkara burtur frá honum, og hann steðgaði á hjá okkum, meðan vit bara hugsaðu um at fáa hjálp á tí vertsliga støðinum, sum vit vóru á. Hann bað okkum fylgja sær, hóast vit ikki skiltu ætlanina við øllum.

Armur Harrans er nóg langur at náa okkum, har vit eru. Tað er tann sannleikan, vit fleiri ferðir hoyra um hesa tíðina upp undir páskir. Okkum tørvar at hoyra tað endurtikið, tí um vit ikki fáa eygu okkara fest á, hví Jesus mátti ganga vegin niðan til Jerusalems og lata lív okkara vegna, so fara vit aldri at skilja, hvat tað merkir, at armur hansara ikki er ov stuttur at kunna frelsa.

Vit skulu grípa hond hansara, og tað kunnu vit við at venda okkum til hansara og biðja um at fáa lut í tí, sum hann kom at gera fyri okkum. Ta bønina hoyrir hann. Líka so trygt sum tað er, at armur hansara er nóg langur at røkka okkum, líka so vist er tað, at oyru hansara eru opin og eru før fyri at hoyra okkum.

***Lov, prís og heiður havi Drottur ríki,***
***sum letur son sín verða mannalíki.***
***Frá hugmóðsmeini okkum leiðir beini,***
***vær søkjum eyðmjúk sess á flórgarðssteini.***

# Stúrið ikki!

*Stúrið ikki fyri degnum í morgin; tí morgindagurin man stúra fyri sínum egna. Hvør dagur hevur nóg mikið í síni plágu.*
*Matt. 6,34.*

Vár Harra Jesus Kristus visti, at onki er, sum ger menniskjað so vónleyst sum stúran. Og hann visti, at stúranin er so alkend og so víða um, at hon nívir øll menniskju í hesum heimi.

Tí gav Jesus okkum hesi orðini og bað við myndigari og kærligari rødd: „Stúrið ikki!“ Hví skulu vit ikki stúra? Tí tað er nyttuleyst. Hvussu torfør støða menniskjans enn kann vera, so er vist, at hon batnar ikki, tá ið vit stúra.

Ongin kann við at stúra leggja eina alin aftur at vøkstri sínum. Stúran lyftir ongantíð upp, men bara trýstir niður. Hon lættir ikki um, men ger bara ***byrðina*** tyngri. Hon tekur altíð burturav, men leggur ongantíð afturat.

*Kann betri nakar bjóða her,*
*enn Jesus bjóðar tær?*
***Tveit byrðina,*** *sum ov tung er,*
*og glaður til Jesus far!*

*t.* týddi.

---

Fólk, sum framleiða grenj og knarr í hópatali, draga øll onnur niður. Guds orð sigur: „Glatt hjarta gevur heilsubót góða...“ Orðt. 17,22. Ein góður partur av skemtingarsemi ger alt lættari og ger arbeiðsplássið betri fyri allar partar.

*e.c.* ums.

# Alt tað vakra

Um vit hongdu alt heimsins gull og floyal upp á eina rósu ella viól, hevði svarið kortini verið: „Eg vil, at Meistarin har uppi í Himlinum, sum eisini prýðir smáfuglarnar, heldur skal prýða meg, enn allir heimsins silkiskraddarar," skrivaði Martin Luther.

Um vit gleðast um fuglasang og sprettandi blómur, er tað ikki meira enn rímiligt at ofra Meistaranum har uppi nakað, honum, sum hevur skapað alt tað vakra. Støðugt meira finna granskarar út av fløkta bygnaðinum á mikrostøði, sum ger, at alt er, sum tað er. Men har er øgiliga nógv, sum vit ***ikki*** skilja.

Tann vísi Sálomon skrivar í Prædikaranum(3,*11*)***: „Alt hevur hann gjørt lagaligt til sína tíð, eisini ævina hevur hann lagt í hjørtu teirra, men tó so, at menniskjan ikki er før fyri at skilja tað verk, sum Gud ger, frá upphavi og til enda."***

# Lat Jesus sita við róðrið

Í einari andakt segði Asbjørn Kvalbein nakað soleiðis: „Fyri einum hundrað árum síðani var tað ein lækni, sum búði í Chicago. Hann æt Leo Winther. Eina náttina bleiv hann vaktur, tí onkur bankaði harðliga á hurðina. Hann fór upp. Tað vísti seg, at ein ferðsluvanlukka hevði verið, og læknin bleiv biðin um at koma á sjúkrahúsið beinanvegin, tí ein drongur var álvarsliga skaddur.

Læknin læt seg í og fór oman í bilin og koyrdi avstað. Eftir sum at hetta hevði skund, helt læknin, at hann skuldi taka stytstu leið og koyra eftir nøkrum síðugøtum. Men tað var ikki vandaleyst at koyra í tí býarpartinum, nógvur kriminalitetur var har. Tá ið læknin einaferð steðgaði fyri reyðum ljósi, leyp ein maður á bilin og skræddi hurðina upp. Maðurin var í einari slitnari gráari skjúrtu, og hann hevði hatt á høvdinum. Hann tók í økslina á læknanum og dró hann út úr bilinum og segði: „Eg havi brúk fyri hesum bili!" So koyrdi hann avstað við nógvari ferð, og har stóð Leo Winter. Tað tók honum tveir tímar, áðrenn hann kom fram á eina telefonautomat, har hann kundi ringja eftir einum hýruvogni.

Tá ið hann kom á sjúkrahúsið, kom ein sjúkrarøktarfrøðingur ímóti honum og segði, at drongurin var beint nú deyður. „Pápi

hansara er spinnandi óður, tí tú ikki ert komin fram; men far tú heldur sjálvur og tosa við hann," segði sjúkrarøktarfrøðingurin.

Tá ið læknin kom yvir til pápan, kendi hann hann aftur beinanvegin. Hetta var maðurin í gráu skjúrtuni við hatti á høvdinum. Hetta var maðurin, sum hevði tikið bilin av honum.

Syrgiligt var tað; men pápin hevði sjálvur forðað fyri, at læknin kanska kundi grøtt drongin. Hetta hendi tá, men tað sama hendir dagliga. Menniskju skumpa Jesus til viks og taka sjálvi róðrið í hond. Tá ið tað so gongst illa, geva tey honum skyldina, eins og hesin pápin gjørdi. Nei, bið altíð fyrst, áðrenn tú fert undir at gera okkurt, og legg teg og øll tíni í Guds hond. Tað er rætti mátin. „Fedrar várir … litu á teg, og tú bjargaði teimum." Sálm. 22,5. „Sælur er tann, sum hevur Jákups Gud sær til hjálpar." Sálm. 146,5.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Tá ið Rich Stearns varð trúlovaður, ætlaði genta hansara at bíleggja nakað av postalíni, men hann segði við hana: „So leingi tað eru børn, sum hólka runt í verðini, skulu vit ikki eiga postalín, krystall ella silvur." Onkur hevur sagt, at tað besta í lívinum eru ikki ting. Lukkan hongur ikki í hesum, hvat ið tú eigur. Hon liggur í sambondum, og tað sambandið, tú hevur mest brúk fyri, er sambandið við Gud, av tí at allar signingar koma frá honum. Í einari strongdari og ørvitisligari verð gevur Gud tær virðir at liva eftir. „Sælur (t.e. lukkuligur) er tann, ið Harran óttast og boð hans elskar av sonnum." (Sálm. 112,1).

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 18. mars | Tekstur: Matt. 27,31b-51+54; | bíbliuorð: Matt. 27,54c |
| 25. mars | Tekstur: Matt. 28,1-15; | bíbliuorð: Matt. 28,6a |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74